# Munnligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

**Spyrjari:** Jørgen Niclasen, løgtingsmaður

**Svarari:** Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

**Evni:** Afturkalling av uppsøgn av útbúgvingarstjóranum á Glasi

**Spurningar:**

1. Heldur landsstýrismaðurin seg hava umsitið á fullgóðan hátt í málinum um uppsøgn av undirvísingarstjóranum á Glasi?
2. Fær Glasir eykajáttan at rinda rokningina, sum stendst av avgerðini hjá landsstýrismanninum?

**Viðmerkingar:**
Málið um uppsøgn av undirvísingarstjóranum á Glasi er so mikið prinsipielt, at landsstýrismaðurin ikki kann frásiga sær ábyrgd. Ikki minni enn tvær fer hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið tikið avgerð. Seinnu fer eftir at hava biðið advokat lýst málið. Adokatfrágreiðingin finst at viðgerðini hjá aðalráðnum av málinum. Advokaturin sigur, at tað framgongur av málinum, at eitt berandi sjónarmið hjá BUMR at ógilda uppsøgnina byggir á tað faktum, at ætlanin við bygnaðarbroytingunum var at víðka um starvsfólkahópin í fyrisitingini á Glasi. Hann staðfestir, at eisini hetta faktum er skeivt.
Her kann av røttum spyrjast, um fyrisitið er á fullgóðan hátt?

Avgerðin hjá BUMR fer at kosta nógvan pening, og tí verður spurt, hvør skal rinda. Fer landsstýrismaðurin at finna pening til eina eykajáttan til at rinda fyri sína egnu avgerð, ella skal Glasir sjálvt finna peningin í undirvísingini, t.e., at næmingarnir í síðsta enda møguliga skulu rinda prísin?

**Á Løgtingi, 19. september 2024**

Jørgen Niclasen